# Uppskot

## um

## kunngerð um standard hýruvognsreglugerð

### Gildisøki

**§ 1.** Henda reglugerð er galdandi fyri alla hýruvognskoyring í og úr kommununi (kommununum).

### Hýruvognsloyvi

**§ 2.** Til at skipa fyri hýruvognskoyring, t.e. vinnuligur fólkaflutningur av í mesta lagi 9 ferðandi, førarin viðroknaður, krevst hýruvognsloyvi. Loyvi verður givið av kommununi eftir umsókn og gevur rætt til at søkja hýru í kommununi.
*Stk. 2.* Hvør hýruvognur skal hava hýruvognsloyvi, og sama loyvi kann ikki fevna um meira enn ein hýruvogn.
*Stk. 3.* Hýruvognsloyvið skal sita á sjónligum stað í hýruvogninum.
*Stk. 4.* Hýruvognsloyvið er galdandi í 5 ár. Kommunan kann tó í serligum føri geva loyvi fyri styttri tíðarskeið.

### Loyvishavarar

**§ 3.** Hýruvognsloyvi kann verða veitt einstøkum persónum og feløgum, um persónurin ella felagið er heimahoyrandi í Føroyum.
*Stk. 2* Einstaklingar, ið søkja um hýruvognsloyvi, skulu lúka hesi krøv:

1. Ikki hava sýnt víst tílíka atferð, at orsøk er at halda, at viðkomandi ikki er skikkaður at skipa fyri hýruvognskoyring.
2. Vera myndugur.

*Stk. 3.* Feløg v.m., ið søkja um hýruvognsloyvi, skulu leiðast av einum leiðara, ið lýkur treytirnar í stk. 2, og leiðarin skal hava góðkenning frá kommununi.
*Stk. 4.* Allir loyvishavarar skulu vera knýttur at góðkendari hýruvognsstøð í kommununi.
*Stk. 5.* Loyvishavari skal til eina og hvørja tíð tryggja sær, at hýruvognsførarar hava neyðuga góðkenning, sbr. § 4.
*Stk. 6.* Sami loyvishavari kann hava fleiri hýruvognsloyvi.
*Stk. 7.* Loyvishavari hevur skyldu at boða kommununi frá, um broytingar eru í viðurskiftum, ið hava ávirkan á givin loyvi ella viðgerðina av einari umsókn, sbr. stk. 1-5.

### Hýruvognsførarar

**§ 4.** Hýruvognsførari skal hava góðkenning frá kommununi og skal annaðhvørt koyra fyri góðkendan loyvishavara ella sjálvur hava hýruvognsloyvi.
*Stk. 2.* Fyri at fáa góðkenning sum hýruvognsførari skal umsøkjarin:

1. Ikki hava sýnt víst tílíka atferð, at orsøk er at halda, at viðkomandi ikki er skikkaður at koyra hýruvognskoyring.
2. Hava førarabræv til hýruvogn, vinnuligan fólkaflutning, bólkur B.
3. Vera myndugur.

*Stk. 3.* Góðkenning skal verða borin á sjónligum stað.
*Stk. 4.* Góðkenningin er galdandi í 5 ár. Kommunan kann tó í serligum føri góðkenna førara fyri styttri tíðarskeið.

## Hýruvognsstøðir

**§ 5.** Støðin skal hava fasta adressu í kommununi og skal hava góðkenning frá kommununi.
*Stk. 2.* Støðin skal hava í minsta lagi x bilar í rakstri, og fer talið niður um x bilar, kann góðkenningin verða tikin aftur.
*Stk. 3.* Allir hýruvognar, sum eru knýttir at støðini, skulu hava hýruvognsloyvi, sum er útskrivað av kommununi.
*Sstk. 4.* Støðin skal hava bíleggingartelefon, og skal telefonsamband vera millum støðina og allar tilmeldaðu bilarnar. Tekniski útbúnaðurin skal vera av tílíkum slag, at lættliga og uttan drál slepst í samband við støðina og bilarnar.
*Stk. 5.* Støðin skal hava bil í rakstri alt samdøgrið og møguligt skal vera at koma í samband við avgreiðsluna alt samdøgrið.
*Stk. 6.* Fyri at tryggja, at krøvini í stk. 1-5 verða hildin, skulu allar støðir góðkennast av kommununi.
*Stk. 7.* At hava ábyrgdina av støðini skal verða settur støðleiðari, ið skal lýka treytirnar í § 3, stk. 2.
*Stk. 8.* Kommunan skal hava navn og bústað hjá tí, sum hevur ábyrgdina av støðini og øllum teim loyvishavarum og hýruvognsførarum, ið knýttir eru at støðini.

## Umsóknir

**§ 6.** Í sambandi við umsókn um hýruvognsloyvi, góðkenning av førara, góðkenning av leiðara fyri felag ella góðkenning av støðleiðara skal nýtast serligt umsóknarskjal, ið verður útflýggjað av kommununi.
*Stk. 2.* Saman við umsóknarskjalinum skulu hesar upplýsingar vera við:

1. Váttan um tilknýti til støð, er talan um loyvishavara.
2. Avrit av navnabrævi/dópsbrævi,
3. Avrit av koyrikorti, er talan um førara.
4. Tekningarútskrift frá Skráseting Føroya ella avrit av stovningarskjali, er talan um feløg.
5. Avrit av revsiváttan viðvíkjandi umsøkjara ella leiðara, er talan um felag.

*Stk. 3.* Umsøkjari skal annars lata kommununi allar upplýsingar, ið neyðugar eru fyri at viðgera umsóknina.

## Afturtøka av loyvum og góðkenningum

**§ 7.** Hýruvognsloyvið kann verða tikið aftur um:

1. Brot er framt á hesa reglugerð ella treytir í loyvinum.
2. Loyvið í meira enn 3 mánaðir ikki hevur verið í nýtslu.
3. Loyvishavari verður útihýstur frá støðini, og hann innan 3 mánaðir ikki kann vátta fyri kommununi, at hann annaðhvørt er knýttur at aðrari støð ella hevur stovnað egna støð.

*Stk. 2.* Góðkenning av hýruvognsførara kann verða tikin aftur, um brot er framt á hesa reglugerð ella treytir fyri góðkenning.
*Stk. 3.* Góðkenning av hýruvognsstøð kann verða tikin aftur, um brot er framt á hesa reglugerð ella treytir fyri góðkenning, og fær støðleiðslan tá 6 mánaðar skotbrá at avtaka støðina.
Stk. 4. Góðkenning av leiðara fyri felag ella av støðleiðara kann verða tikin aftur, um brot er framt á hesa reglugerð ella treytir fyri góðkenning.
*Stk. 5.* Hýruvognsloyvi, góðkenning av hýruvognsførara, leiðara fyri felag, støðleiðara ella góðkenning av hýruvognsstøð kunnu harumframt verða tikin aftur, um skeivar ella villeiðandi upplýsingar eru latnar kommununi, ella um viðkomandi upplýsingar eru hildnar aftur fyri kommununi.

## Fyrisiting

**§ 8.** Kommunan kann krevja gjald fyri allar góðkenningar sambært hesi kunngerð. Gjaldið verður annars at rinda av umsøkjaranum frammanundan umsókníni.
*Stk. 2.* Allar avgerðir sambært hesi kunngerð verða tiknar av kommununi.
*Stk. 3.* Semjast tvær ella fleiri kommunur um felags hýruvognsreglugerð, skal avtala fyriliggja millum kommunurnar um skipan av fyrisitingini, og verður hetta lýst í hýruvognsreglugerðini fyri kommunurnar.

## Revsing

**§ 9.** Sambært § 4 í lógini verða brot á reglurnar í hesi reglugerð, ella treytir, givnar í loyvi til hýruvognskoyring, revsað við bót.
*Stk. 2.* Er brotið framt av einum felag ella tílíkum, kann felagið koma undir bót eftir reglunum í kap. 5 í revsilógini.

## Gildiskoma og skiftisreglur

**§ 10.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2010.
*Stk. 2.* Fyri hýruvognsloyvi, ið eru givin áðrenn gildiskomu av hesi kunngerð, verður freist givin á eitt ár, at fáa formligu viðurskiftini í rættlag, herundir at fáa kravdu góðkenningina frá kommununi.
*Stk. 3.* Innan 1 ár, frá gildiskomu av hesi kunngerð, skulu allir hýruvognsførarar hava fingið góðkennning frá kommununi.
*Stk. 4.* Innan 1 ár, frá gildiskomu av hesi kunngerð, skulu allir leiðarar fyri feløg, støðleiðarar og allar hýruvognsstøðir hava fingið góðkennning frá kommununi.

# UMSÓKNARBLAÐ TIL AKSTURVINNU
# Hýruvognsloyvi (einstaklingur)

**Verður útfylt av umsøkjara:**
**(skrivið við spjaldrarstavum)**

| |
|---|
| Navn: |
| Føðingardagur og ár: |
| Bústaður: |
| Telefon: |
| Teldupostur: |

**Verður útfylt av kommununi:**

| | |
|---|---|
| | Váttan um tilknýti til góðkenda hýruvognsstøð |
| | Avrit av navnabrævi/dópsbrævi |
| | Avrit av revsiváttan |
| | Annað: |

**Eg vátti, at eg í bestu sannføring míni havi svarað spurningunum satt:**

Dagfesting: / - 20

Undirskrift

**Góðkent vegna kommununa:**

Dagfesting: / - 20

Undirskrift

# UMSÓKNARBLAÐ TIL AKSTURVINNU
# Hýruvognsloyvi (felag)

**Verður útfylt av umsøkjara:**
**(skrivið við spjaldrarstavum)**

| |
|---|
| Navn á felag: |
| Ábyrgdari: |
| Stovningardagur (skrásetingarnr) |
| Bústaður: |
| Telefon: |
| Teldupostur: |

**Verður útfylt av kommununi:**

| | |
|---|---|
| | Váttan um tilknýti til góðkenda hýruvognsstøð |
| | Tekningarútskrift frá Skráseting Føroya |
| | Upplýsingar um fíggjarætlan og avrit av nýggjasta roknskapinum |
| | Annað: |

**Eg vátti, at eg í bestu sannføring míni havi svarað spurningunum satt:**

Dagfesting: / - 20

Undirskrift

**Góðkent vegna kommununi:**

Dagfesting: / - 20

Undirskrift

# UMSÓKNARBLAÐ TIL AKSTURVINNU
Hýruvognsførari

**Verður útfylt av umsøkjara:**
**(skrivið við spjaldrarstavum)**

| |
|---|
| Navn: |
| Føðingardagur og ár: |
| Bústaður: |
| Telefon: |
| Teldupostur: |

**Verður útfylt av kommununi:**

| | |
|---|---|
| | Avrit av navnabrævi/dópsbrævi |
| | Avrit av koyrikorti – áteknað til hýruvognskoyring |
| | Avrit av revsiváttan |
| | Heilsuváttan |
| | Váttan fyri luttøku av skeiði í fyrstu hjálp |
| | Annað: |

**Eg vátti, at eg í bestu sannføring míni havi svarað spurningunum satt:**

Dagfesting: / - 20

Undirskrift

**Góðkent vegna kommununi:**

Dagfesting: / - 20

Undirskrift

# FYLGISKJAL TIL UMSÓKNARBLØÐ TIL AKSTURVINNU

- Fyri at fáa hýruvognsloyvi (sum einstaklingur ella sum felag) í kommununi, skulu avrit av skjølum sambært umsóknarblað um hýruvognsloyvi útflýggjast. Eru treytirnar sambært hesum skjølum uppfyltar, verður loyvi givið. Loyvið er: góðkenda umsóknarblaðið, umframt eitt merkið við upplýsingum um loyvishavara og dagfesting av loyvinum, sum skal setast á sjónligt stað í hýruvogninum. Hýruvognsloyvi verður givið sambært kunngerð nr. xx um hýruvognskoyring í kommununi frá xx. Xxxx. Loyvið er galdandi í 5 ár frá dagfesting og má síðani endurnýggjast. Førarar til hýruvognin skulu hava góðkenning sambært umsóknarblaði til hýruvognsførara. Loyvishavari, ið sjálv/ur koyrir bilin skal sostatt eisini hava góðkenning sum hýruvognsførari.

- Fyri at koyra hýruvogn í kommununi, skulu avrit av skjølum sambært umsóknarblað um hýruvognsførara útflýggjast. Eru treytirnar sambært hesum skjølum uppfyltar, verður góðkenning givin. Góðkenningin er: góðkenda umsóknarblaðið, umframt eitt merkið við upplýsingum um føraran og dagfesting av góðkenningini, sum skal berast á sjónligum stað undir koyring. Góðkenning at koyra hýruvogn verður givin sambært kunngerð nr. xx um hýruvognskoyring kommununi frá xx. Xxxx. Góðkenningin er galdandi í 5 ár frá dagfesting og má síðani endurnýggjast. Góðkendur førari kann koyra hýruvognskoyring í kommununi fyri góðkendan loyvishavara, ið koyrir fyri góðkenda hýruvognsstøð. Loyvishavari og hýruvognsførari kann verða sami persónur.

**Viðmerkingar:**

***Alment:***

Í mun til standard hýruvognsreglugerðina frá 1983, er í hesum uppskotinum:

1. Ikki tiknar við reglur um innrætting vm. av hýruvogni. Hesar reglur eru væl útgreinaðar í kunngerð nr. 4 frá 27. januar 1967 um motorakfør, sum verða nýtt til vinnuligan fólkaflutning, sum seinast broytt við kunngerð nr. 123 frá 28. september 2009.
2. Ikki tiknar við reglur, ið bera við sær
   a. Avmarking í talinum av hýruvognsloyvum í kommununi/økinum, ið hýruvognsreglugerðin fevnir um. V.ø.o. skulu loyvi ikki longur lýsast leys av kommununi, og øll, ið søkja um hýruvognsloyvi, fáa loyvi, um tey annars lúka objektivar treytir og eru knýtt at góðkendari hýruvognsstøð.
   b. At bert einstaklingar kunnu fáa hýruvognsloyvi og sum meginregla bert eitt loyvi. Nú verður møguligt hjá juridiskum persóni eisini at fáa hýruvognsloyvi.
   c. At hýruvognstakstir skulu verða í hýruvogninum, og uppslag vísa tí ferðandi, at hann kann biðja um at síggja teir.
   d. Hvussu førari av leysum hýruvogni skal bera seg at, um hann fær áheitan um hýrukoyring, og hvørja leið hann skal koyra teimum, ið leiga hýruvogn.
   e. At sum meginregla skal loyvi treytast av, at tað verður nýtt til fulltíðarvinnu.
   f. At avgerðir kunnu kærast til Føroya landsstýri.
3. Lagt upp til, at ynskir kommuna/øki hýruvognsreglugerð setta í gildi í kommununi, er tað ein treyt, at tey, sum fáa hýruvognsloyvi hava skyldu at verða knýtt at hýruvognsstøð, ið skulu hava ávíst tal av hýruvognum at bjóða út. Hýruvognsstøð kann ikki avmarka talið á loyvum hjá sær og kann ikki vísa hýruvognsloyvi, ið kommunan hevur givið eftir reglunum frá sær. Til ber hjá teimum, ið hava hýruvognsloyvi, at stovna nýggja hýruvognsstøð, ið skal góðkennast eftir reglunum, men eitt krav er, at nóg nógv loyvi eru knýtt at nýggju støðini, so hon kann kann koma tørvinum hjá borgarunum á møti.
4. Lagt er upp til, at fleiri kommunur kunnu ganga saman um at hava felags hýruvognsreglugerð.

***Til einstakar greinar:***

Ad §1 Her verður ásett, at reglugerðin er galdandi alla hýruvognskoyring í og úr kommununi/økinum.

Ad §2 Hvør hýruvognur skal hava sítt hýruvognsloyvi, ið er galdandi í 5 ár.

Ad §3 Her verða krøv sett teimum, sum søkja um hýruvognsloyvi, m.a. um at vera myndugur og ikki at hava víst seg óskikkaðan. Øll, sum fáa loyvi, skulu vera knýtt at góðkendari hýruvognsstøð í kommununi/økinum.

Ad §4 Hýruvognsførarin skal hava góðkenning frá kommununi. Ad §5 lýsir krøv til hýruvognsstøðir og støðleiðara.

Ad §6 lýsir, hvussu umsóknir skulu latast inn.

Ad §7 Um afturtøku av loyvum.

Ad §8 Um fyrisiting

Ad §9 Um revsing

Ad §10Gildiskoma og skiftisreglur.